# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 17.01.2024 |
| Mál nr.: | 23/25586 |
| Málsviðgjørt: | MJ |
| Ummælistíð: | 17.01.24/07.02.24 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Virkisskrá

(Dagføring av listanum yvir grundardátur og viðgerð av p-talinum)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 70 frá 9. mai 2019 um Virkisskrá, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, nr. 3, verður orðað soleiðis: "gera grundardátur tøkar, sbrt. § 15.”

**2.** Í § 3, nr. 1, verður “og hevur ein umsetning yvir 30.000 kr.,” strikað.

**3.** § 8, stk. 1,  nr. 12, stk. 2, nr. 9 og stk. 3, nr. 9 verða strikaðar.

**4.** Í § 8, stk. 1 verður aftaná nr. 16 sum nýggj nummur sett:

“17) Eigaraupplýsingar.
18) Roknskaparár.”

**5.** § 15, stk. 2, verður orðað soleiðis: “Privat kunnu bert viðgera p-tøl samsvarandi løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum”.

**6.** § 15, stk. 3-5 verður strikað.

**7.** §§ 16 og 17 verða strikaðar.

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Við uppskotinum verða tríggjar høvuðsbroytingar gjørdar í løgtingslóg um Virkisskrá:

- Heimildin hjá privatum virkjum at fáa útflýggjað p-tøl hjá stjórnar- og nevndarlimum verður tillagað soleiðis, at samsvar verður við krøvini í dátuverndarlógini.
- Listin yvir grundardátur verður dagførdur soleiðis, at "roknskaparár" og "eigaraupplýsingar" verða lagdar afturat, meðan "starvsfólkatal" verður strikað.
- Umsetningskravið á 30.000 kr. fyri sjálvstøðugt vinnurekandi verður strikað.

Løgtingslóg um Virkisskrá var smíðað í 2017 og 2018 av einum arbeiðsbólki, ið var mannaður við starvsfólki frá Gjaldstovuni, Skráseting Føroya, TAKS, Hagstovuni og Heilsu- og innlendismálaráðnum (ið hevði ábyrgd av hesum øki, tá lógararbeiðið byrjaði). Løgtingslógin um Virksskrá kom í gildi í mai 2019.

KT-skipanin, ið skal hýsa Virkisskránni, verður sett í verk í 2024, t.e. umleið 5 ár eftir, at lógin kom í gildi.

Hetta, at lógin er sett í gildi fleiri ár áðrenn sjálv KT-skipanin er liðug ment, hevur havt við sær, at tað ikki altíð er samsvar millum lógina og KT-skipanina. Mett verður, at tað í einstøkum førum er skilabetri at gera broytingar í lógini heldur enn KT-skipanini, fyri at Virkisskráin skal verða væl útbreidd og føroyska samfelagið fær mest møguligt gagn av Virkisskránni. Eitt dømi er, at við galdandi lóg kunnu P-tøl bert útflýggjast úr Virkisskránni til almennar stovnar og ikki til privat virkir. Hetta er meiri avmarkandi enn krøvini í dátuverndarlógini og vil hava við sær - um eingin lógarbroyting verður framd - at peningastovnar og tryggingarfeløg o.o. ikki fáa atgongd til p-tølini í Virksskránni, hóast hesar fyritøkur eru álagdar í aðrari lóggávu at nýta p-talið, t.d. í skatta- og hvítvasklógini.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóg um Virkisskrá inniheldur í ávísum førum ásetingar, ið annaðhvørt hava víst seg at vera ov kostnaðarmiklar at menna ella eru mettar at kunna hindra útbreiðsluna av Virkisskránni í føroyska samfelagnum sum grundskrá um virkir í Føroyum. Her verður serliga hugsa um, at privat virkir sum nú er ikki fara at hava nóg gott gagn av at brúka virkisskránna, tá tey ikki kunnu fáa útflýggjað p-tøl.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við hesum broytingaruppskoti er at tryggja, at samsvar er millum lógina og innihaldið í teknisku loysnina og at Virkisskráin kann útbreiðast og verða til mest møguligt gagn í føroyska samfelagnum. Serliga er umráðandi, at privat virkir fáa heimild at kunna viðgera p-tøl samsvarandi løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum og á tann hátt fáa fult gagn av virkisskránni sum eitt amboð.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum fáa privat virkir í størri mun fáa gagn av Virkisskránni tí, at atgongd verður givin til p-tøl, um heimild er til hetta sbrt. dátuverndarlógini. Eisini verða nýggjar grundardátur knýttar í Virkisskránna, t.e. eigaraupplýsingar og roknskaparár, og hetta vil viðføra eina effektivisering av virkseminum hjá almennum stovnunum og fyritøkum, ið hava tørv á hesum upplýsingum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið er sent í almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Landsstýrinum umframt at uppskotið er sent til ummælis hjá hesum pørtum um:

TAKS
Skráseting Føroya
Hagstovan
Dátureftirlitið
Vinnuhúsið
Felagið Peningarstovnar
Betri Trygging
Trygd
Lív
Betri Pensjón

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Listin yvir grundardátur verður dagførdur soleiðis, at roknskaparár" og "eigaraupplýsingar" verða lagdar afturat. Hetta vil viðføra eina effektivisering av umsitingini hjá almennum stovnunum, ið hava tørv á hesum upplýsingum.

Tað eru fyritøkurnar sjálvar, ið skráseta upplýsingar um roknskaparár og eigaraupplýsingar, og hetta vil tí ikki viðføra eyka umsiting fyri land ella kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna.

Við at strikað forboðið hjá privatum at fáa útflýggjað p-talið hjá stjórnar- og nevndarlimum, kunnu peningastovnar, tryggingarfeløg o.o. brúka Virkisskránna á nøktandi hátt. Mett verður, at hesar fyritøkur kunnu fáa stórt gagn av Virkisskránni, m.a. í mun til at lúka krøv í løggávu um hvítvask. Fleiri privat feløg eru kravd at brúka p-talið, t.d. í skattalóggávu og hvítvasklóggávu.

Listin yvir grundardátur verður dagførdur soleiðis, at "roknskaparár" og "eigaraupplýsingar" verða lagdar afturat. Fyritøkurnar skulu sjálvar skráseta hesa upplýsingar, men hetta eru tær longu kravdar at gera í dag, og hetta vil tí ikki viðføra eyka umsiting fyri vinnuna. Broytingin í hesum lógaruppskoti vil bert viðføra, at heimild verður til at almannakunngera hesar upplýsingar í Virkisskránni.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur, ið hesir ikki hava longu í dag.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Nr. 1.**
Konsekvensrætting av, at § 16 verður strika

**Nr. 2.**
Við ásetingini verður "*og hevur ein umsetning yvir 30.000 kr.,*" strikað.

Markið á 30.000 kr. var upprunaliga sett við støði í táverandi § 4 um avgjaldsfrítøku í lógini um meirvirðisgjald fyri at hava eitt bagatelmark fyri, hvat lá í Virkisskránni. Hetta mark er nú í meirvirðisgjaldslógin sett til 50.000 kr. Mett verður, at tað er ikki skilagott at skriva eitt nágreiniligt tal inn í hesa lógina, ið er tengt at einum tali, sum kann verða dagført javnan í aðrari løggávu.

Harumframt kann ein sjálvstøðugt vinnurekandi hava tørv á at fáa eitt v-tal og verða skrásett í Virkisskránni, hóast viðkomandi er undir markinum fyri meirvirðisgjaldskyldu.

Millum annað hevur markið fyri meirvirðisgjaldskyldu ongan týdning fyri skattskylduna. Sjálvstøðug vinnurekandi í Føroyum eru skattskyldug eftir § 1 í skattalógini, óansæð um umsetningurin er undir ella yvir markið fyri meirvirðisgjaldskyldu. Eisini ber til at fara upp um markið fyri meirvirðisgjaldskyldu uttan at gerast meirvirðisgjaldskyldugur, nevniliga um seldar tænastur/vørur ikki eru fevndar av meirvirðisgjaldskylduni (frítiknar fyri MVG). Tað kemur eisini fyri, at virkir einkult ár ikki umseta pening, ella umseta lítið, tí tey eru fyribils óvirkin ella nýstovnaði.

Onnur dømi um at, tørvur er at skráseta virkir hóast hesi eru undir markinum fyri meirvirðisgjaldskyldu eru í lóg um lønhæddaravgjald. TAKS má kunna skráseta við v-talið t.d. ein fysioterapeut fyri lønarhæddaravgjald, eisini um viðkomandi hevur ein umsetning, sum er undir markinum fyri meirvirðisgjaldskyldu.

**Nr. 3.**

Við ásetingini verður "Starvsfólkatal" strikað í listanum yvir grundardátur.

Tað er eingin nøktandi dátukelda tøk við upplýsingum um starvsfólkatal og hevur mann valt at starvsfólkatal ikki skulu við í Virkskránna.

**Nr. 4.**
Við ásetingini verða "Eigaraupplýsingar" og "Roknskaparár" løgd afturat listanum yvir grundardátur.

*Viðv. "eigaraupplýsingar"*
Við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019 varð álagt kapitalfeløgum og øðrum løgfrøðiligum eindum (einstaklingsvirkir undantikin) at skráseta upplýsingar um veruligar eigararnar í kt-skipan Skráseting Føroya, undir hesum rættindi hjá teimum veruligu eigarunum. Skyldurnar at skráseta veruligu eigararnar í feløgum og løgfrøðiligum eindum hevur sín uppruna í ES-lóggávu og altjóða tilmælum, sum hava til endamáls at áseta altjóða standardar fyri tiltøk móti m.a. hvítvasking, fígging av yvirgangi, fíggjarligum brotsverkum og skattaundandrátti.

Sambært vinnufelagalóggávuni er talan um verulig eigaraviðurskifti, tá ein fysiskur persónur beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 25% av eigarapørtunum ella atkvøðurættinum í einum felag ella løgfrøðiligari eind. Talan er um eina ítøkiliga meting, t.v.s. at aðrir persónar kunnu eisini vera fevndir av hugtakinum. Tá ið eitt felag ella ein løgfrøðilig eind staðfestir, at ein persónur er veruligur eigari, so skapar hetta ymiskar skyldur viðvíkjandi innheintan, skráseting, varðveitslu og víðarilatan av upplýsingunum, umframt revsing fyri brot á skyldurnar. Hesar reglur eru ásettar í lóggávuni í vinnufelagalóggávuni, og er tað sostatt vinnufelagalóggávan, ið er avgerandi fyri, nær og á hvønn hátt upplýsingarnar skulu skrásetast í KT-skipan Skráseting Føroya.

Fyri at røkka endamálinum, ið liggur til grund fyri skyldurnar hjá feløgum og løgfrøðiligum eindum at skráseta upplýsingar um veruligu eigararnar, er tað neyðugt at tryggja, at upplýsingarnar eru lætt atkomiligar fyri eftirlitsmyndugleikar og persónar, sum sambært hvítvasklóggávuni hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, undir hesum útlendskir myndugleikar/vinnurekandi. Tískil verður tað mett at vera hóskandi at broyta løgtingslóg um Virkisskrá, soleiðis at tað verður greitt, at upplýsingar um veruligu eigararnar eru grundardátur, ið skulu skrásetast í Virkisskránni. Lagt verður upp til, at tá ið Virkisskrá er liðugt ment og tikin í nýtslu, verða upplýsingarnar um veruligu eigararnar skrásettar í Virkisskrá samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum í vinnufelagalóggávuni.

*Viðv. "roknskaparár"*
Dømi um stovnar, ið fáa gagn av, at roknskaparárið verður grundardáta í Virkisskránni eru TAKS og Skráseting Føroya. Roknskaparárið er viðkomandi fyri TAKS, tí inntøkuárið er roknskaparárið, sbr. § 24, stk. 1, í skattalógini. Roknskaparárið hevur eisini týdning fyri, hvussu leingi roknskapartilfar skal goymast, sí hartil bókhaldslógina, og skulu partafeløg,

sum ikki hava álmanakkaárið sum roknskaparár, lata inn serligt yvirlit til TAKS yvir bókaðar lønir, sí § 118, stk. 2, í skattalógini. Bæði TAKS og Skráseting Føroya kunnu føra eftirlit við, um roknskapartilfar er goymt.

**Nr. 5**
Við ásetingini kunnu privat virkir viðgera p-tøl samsvarandi løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum (dátuverndarlógin).

Galdandi lóg avmarkar atgongdina til p-talið hjá stjórnar- og nevndarlimum til bert almennar stovnar. Hetta er meir avmarkandi enn dátuverndarlógin og vil viðføra – um eingin lógarbroyting verður framd – at peningastovnar og tryggingarfeløg o.o. ikki fáa atgongd til p-tølini í Virkisskránni, hóast hesar fyritøkur eru álagdar í aðrari lóggávu at nýta p-talið. Dømi um hetta eru at fíggjarstovnar sambært § 120 q í skattalógini og kunngerð nr. 11 frá 19. Februar 2016 um eyðmerking og fráboðan av fíggjarkontum við tilknýti til útheimin árliga lata TAKS upplýsingar um p-talið hjá kontueigarum. Sí § 102 í kunngerðini. Fíggjarstovnar kann vera annað enn peningastovnar/bankar, sí §§ 5-10 í kunngerðini, undir hesum eisini íløgueindir og tryggingarfeløg. Annað dømi er í hvítvaskilógini, har fyritøkur skulu skráseta p-tøl um sínar kundar í.s.v. kundakunnleikamannagongdir.

**Nr. 6.**

*§ 15, stk. 3. Verður strikað*

§ 15, stk. 3 sigur, at dagføring av persónsupplýsingum sbrt. § 8, stk.1, nr. 7 og 8 og § 8, stk. 2, nr. 7, steðgar 10 ár eftir, at viðkomandi persónur gerst óvirkin í eindum, skrásettar í Virkisskránni.

Persónsupplýsingar í teknisku loysnini verða heintaðir úr Fólkayvirlitinum. Um persónsupplýsingarnar í Fólkayvirlitinum broytast, t.d. bústaðurin, so fer ein samsvarandi dagføring fram av upplýsingunum í Virkisskránni. Hetta hendir sjálvvirkandi, og ikki er neyðugt, at hetta skal steðga eftir 10 ár.

Allar broytingar verða skrásettar í gerðalista. Hetta merkir, at tað altíð er møguligt at kanna, hvørjar broytingar eru framdar, t.d. hvar ein persónur hevði bústað fyri nøkrum árum síðan.

*§ 15, stk. 4. Verður strikað*
Konsekvensrætting av, at starvsfólkatal verður strikað sum grundardáta.

*§ 15, stk. 5. Verður strikað*
Konsekvensrætting av, at § 15, stk. 4 og § 16, stk. 2 verða strikaðar.

**Nr. 7.**

*§ 16 verður strikað*
Hentleikin at tilskila sær lýsingavernd er ikki mentur til fyrstu slepping av Virkisskránni og av tí at mett verður, at § 6 í løgtingslóg um marknaðarføring um óumbidnar áheitanir regulerar hetta øki á nøktandi hátt, er ætlanin um at menna ein slíkan hentleika í Virkisskránni slept. Ásetingin verður tí strikað.

*§ 17 verður strikað*
Konsekvensrætting av, at § 16 verður strikað.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 17. januar 2024.

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason